


*Kaj Leo í Bartalsstovu hevur júst skorað til 2-0, og sett sísta seymin í kistuna hjá føroyameistarunum úr HB, sum annað árið á rað, blivu sendir úr steypakappingini longu í 1. umfarið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Kósin er sett

**LØGMANSSTEYPIÐ Jógvan Martin Olsen hevur sagt, at Víkingur skal hava gull í ár. Annað hvørt í steypakappingini ella landskappingini. Helst í báðum kappinginum. Hann kom eitt fet nærri um vikuskiftið**

Uni Holm Johannesen

Tú skal vinna á teimum bestu fyrr ella seinni, um tú skal vinna steypakappingina. Tað visti teoritikarin Jógvan Martin Olsen, tá hann skrivaði á heimasíðuni hjá Víkingi, at teir ætla sær gull í hesum kappingarárinum.

Hann visti eisini, at Víkingur skal vinna á hinum biðlunum til føroyameistaraheitið, um teir skulu røkka tindinum. Jógvan Martin Olsen og Víkingur tóku fyrsta fetið um vikuskiftið.

Leygardagin vann hann kærkomnan sigur í Gundadali á Juliani Hansen og HB, sum eru verandi føroyameistarar. Ein týðilig staðfesting av, at Víkingur skal takast í fullum álvara.

– Eingin rann undan sínari uppgávu. Allir røktu sína uppgávu á vøllinum, og tað er uppiborið, at vit eru í fjórðingsfinaluni. Vit vóru bara betri, sigur Jógvan Martin Olsen. Hann hevði fyrireikað seg væl til uppgávuna, sum hann loysti til fulnar.

## Málini í síðstu løtu

Tað eydnaðist ikki eins væl við málskjótini hjá Finni Justinussen í fjør, sum í 2009. Tá var hann toppskjútti. At hann framvegis hevur máltev prógvaði hann, tá fáir minuttir restaðu í av dystinum. Framherjin fann sær pláss við fremru stong og stútaði bóltin í málið eftir hornaspark.

Nú ráddi um at halda fast. Trýsti, sum heimaliðið væntandi fór at leggja seinastu løtuna í royndini at sleppa víðari, kom ongantíð. Víkingur spældi seg til fleiri upplagdar møguleikar. Tað bragdaði hjá innskifta Kaj Leo í Bartalsstovu. Hann økti um leiðsluna, tá hann fekk bóltin fyri føturnar frá Sølva Vatnhamar.

## Yvirlutan eftir steðgin

Tað vóru fáir møguleikar fyri steðgin. Liðini løgdu ikki nógv fyri í framrættaða spælinum í fyrra hálvleiki. Spælararnir vóru grammir eftir bóltinum, og stríðið um bóltin var fyri tað mesta á miðvøllinum.

- HB spældi betri enn í stórsteypadystinum móti EB/Streymur. Teir vóru meira stríðshugaðir. Hinvegin høvdu vit meira spæl og fleiri møguleikar, sigur Jógvan Martin Olsen.

Gestirnir høvdu meira dirvi eftir steðgin. Tá loysnaði. Álopsbogin varð spentur, og liðið flutti seg nakrar metrar fram á vøllin, og Víkingur var á bóltinum fyri tað mesta. Málini komu seinastu løtuna.

## Errin venjari

Jógvan Martin Olsen er errin av avrikinum hjá sínum spælarum. Hann heldur, at tað er serliga hugaligt, at flestu spælararnir hava sín uppruna í felagnum. Síðani stovnina av felagsliðnum hevur málið verið, at so stórur partur av liðnum, sum tað á nakran hátt ber til, skal vera spælarar, ið eru mentir í felagnum. Nú farið er undir fjórða árið við Víkingi, eru tveir útlendingar, og tveir, sum eru aðrastaðni frá úr Føroyum, í hópinum. Hinir búgva í Eystur kommunu.

Málskjúttarnir vóru eisini tveir ungir spírar.

– Tað hevur verið málsetningur allatíðina, og vit hava prógvað, at tað kann loysa seg, staðfestir Jógvan Martin Olsen.

uni@sosialurin.fo



*Ein av nýggju monnunum í Víkingahópinum, Símin Hansen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Nýggju menninir stóðu seg væl

**FÓTBÓLTUR Símin Hansen og Evrard Blé eru knýttir at hópinum hjá Víkingi í vetur. Teir vóru við frá byrjan, og venjarin er væl nøgdur við teirra avrik**

Uni Holm Johannesen

Súni Olsen og Nenad Stankovic fóru í annað felag, og Símin Hansen og Evrard Blé vóru knýttir at hópinum. Tað var útskiftingin í spælarahópinum, sum Jógvan Martin Olsen stjórnar í hesum kappingarárinum.

Jógvan Martin Olsen sigur, at teir hava staðið seg væl í fyrireikingunum, og venjarin er væl nøgdur við teirra avrik í gjár.

– Teir vóru við í spælinum og stríddust væl. Ikki tí, teir skaraðu ikki burturúr. Allir røktu sína uppgávu til lítar, heldur venjarin.